# 3 frá 3'aranum

FLØGUUMMÆLI

# Aqua




## Aquarius

Aqua eru aftur á breytini. Kanska sterkari enn nakrantíð.

Ein techno bólkur. Fjas, ið letur teldurnar gera arbeiðið.

Ja, mong hava orðini verið frá teimum, ið halda seg hava skil fyri tónleiki.

Teldur ella ikki. Aqua er sterkasta boð, ið danir eiga. Ikki tað dyggasta, skal ein røða um tónleikasnildi og mergjaðan og innviklaðan tónleik. Men nakað, ið treingir beint inn hjá fólki kring allan knøttin. Hvørt tað so bert fer inn ígjøgnum oyruni og inn í knøttin, ella tað klárar at røra hjørtuni eisini, skal ikki metast um her. Men inn fer tað.

Melodiøst, so tað stendur eftir. Og at akkordirnar so eru tær somu allan sangin ígjøgnum, enntá uttan at býta pláss, er ein fyrimunur, tí tær verða bukaðar so hjartaliga uppá pláss, so vit minnast tær í svøvni.

Men tað er nakað gott og avslappað við at koyra t.d. Aqua í fløguspælaran. Og øll tey, ið møguliga hildu, at Aqua var ein einasta fløga og ikki meira, mugu nú geva upp. Bólkurin er úti við góðari og sera melodiøsari fløgu. Eisini verður koyrt líka hart uppá "image" og tað ger ofta góðan mun.

Aqua hava prógvað, at dugur er í, um enn talan er um annað enn guitarar og trummur, men teldur og forrit. Nútíðin er teirra og ikki fyri ummælarar, ið minnast LP-pláturnar.

Tað skal sigast: Ein góð fløga frá Aqua, ið her staðfesta seg.

# Mark Knopfler




## Golden Heart

Mark Knopfler kenna mong úr bólkinum Dire Straits, har hann er dugnaligi guitarleikarin við pannibandinum. Hóast summi halda hann ikki síggja út, sum leggur hann petti í nakað sum helst, so er hann leiðarin í bólkinum og drívmegin. Bæði innan skriving og ikki minst, tá swing skal fáast í tónlekin. Tá er guitarspæl hansara av alstórum týdningi.

Hóast fløgan Golden Heart er frá 1996, so er enn ein søluherferð í gongd. Men tað ger einki. Hann hevur givið út fløgur sjálvur við eydnu og hevur eisini gjørt góðan filmtónleik.

Á Golden Heart finna vit góðan tónleik, ið javnvigar. Róligur, men als ikki keðiligur. Tað svingar óført, hóast talan ikki er um tónleikarar, ið gera tær stóru rørslurnar. Her er nevniliga ikki talan um rørslur, men um dugnaskap. Dygd. Tónleik, rætt og slætt.

Og Mark er óivað ein maður við hjartanum á rætta stað. Skemtiligur er t.d. teksturin um fyrrverandi forsetafrúuna Imeldu Marcos. Kona einaræðisráðharran Ferdinand. Hon gjørdist kend fyri at eiga skógvar í túsundtal, meðan fólkið hugraði.

Mark syngur í sanginum Imelda um hana og fegnu handilsmenninar, ið fáa hana innar í handilin. Um øll sløgini av skóm, hon vil hava og " They fill a bucket up and laugh behind her back" og "All the poor people saying that they gotta quit paying for you".

Ein fín fløga.

# Oasis




## Standomg on the shoulder of giants

Oasis eru aftur, nú vit skriva ár 2000. Heimskendir og fyri góð løg, ið kunnu larma, men tó ljóma væl. Heimskendir fyri ymsar skandalur eisini.

Lagt verður út við meira ella minni instrumentala lagnum Fuckin' in the bushes. So vita vit nøkulunda hvar vit eru og hvat er at vænta.

Tó, ein góð og sterk fløga í rætta Oasis stílinum. Bara tað, at ein kann tosa um egnan stíl, sigur ikki einki um bólkin, sum áður hevur verið sammettur við The Beatles. Kanska tað hoyrist í støðum á hesi fløguni eisini.

Noel Gallagher hevur skrivað nærum øll løgini og orðini. Hann hevur eisini produserað saman við Mark "spike" Stent. Liam Gallagher hevur skrivað eitt lag.

Hóast mong kanska bóru banga fyri villu manningini í bólkinum, og at hetta fór at beina fyri bólkinum, so er enn ein glotti fyri framman.

Ein fløga ið prógvar, at enn eru knotur í Oasis.



Hagstova Føroya

**Á Hagstovuni er eitt starv sum fulltrúi leyst at søkja**

**Starvsinnihaldið**
Í høvuðsheitum er uppgávan at arbeiða við vinnuligum og øðrum búskaparligum hagtølum, sum liggja til grund undir ymsum uppgerðum.

Eitt nú til uppgerð av tjóðarroknskapi gera vit sonevndar deildarroknskapir fyri allar privatar vinnur, kommunurnar sum heild, landskassan og donsku statspartarnar í Føroyum. Starvið verður serliga at vera við í arbeiðinum við hesum deildarroknskapum, men kann saktans umfata aðrar hagtalsuppgerðir í sambandi við búskapin annars.

**Persónurin og útbúgvingin**
Brúk er tí fyri einum fólki við góðum innliti í roknskaparviðurskifti og skili fyri samfelagsbúskapi, sum dugir at arbeiða við mest vanligu telduforritum og sum ikki óttast at fara í holt við forriting. Tað er ein fyrimunur at kenna eitt sindur til forriting í SQL ella øðrum forritingarmáli, men ikki eitt krav kortini.

Hóast tað krevst at tú sjálvstøðugt ert førur fyri at loysa uppgávurnar tú fert at sita við, fert tú at hava tætt samstarv við aðrar búskaparfrøðingar, teldufyrisiting og skrivstovufólk á stovninum.

Til starvið krevst útbúgving sum cand.polit., cand.oecon., cand.merc. ella bachelor útbúgving í búskaparligum/fíggjarligum lærugreinum.

**Arbeiðsplássið**
Hagstovan er fyrst og fremst eitt víttfevnandi stað, har ið tú fært innlit í avgerandi og aktuell samfelagslig viðurskifti, tí umframt at lýsa samfelagið í regluligum uppgerðum, eru vit eisini við í lýsingini av øðrum aktuellum viðurskiftum, sum stinga seg upp. Alt sum vit framleiða av vitan og upplýsing er til at kunna borgararnar um, so at ein partur av flestu uppgávum er at hava samskifti við onnur.

**Løn og treytir annars**
Starvið verður lønt eftir sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og avvarandi fakfelag, og setanarøkið er fyrst og fremst Hagstovan, men eisini Fíggjarmálastýrið í síni heild.

**Umsóknarfreist og annað**
Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 15. mars 2000, og starvið skal verða sett so at byrjast kann í seinasta lagi 1. apríl 2000.

Nærri fæst at vita um starvið frá Hagstovuni tlf. 352028.

**Til sølu**

10 stk. lamineraðir bjálkar 11 x 45 cm x 8 m.

Tlf. 217300 ella 316668

Maskinurnar
á "Gamla Reinsarí"
bíliga til sølu.
Eru í sera góðum standi.
Maria Olsen
Tel. 31 26 53
Sosialurin - 311820

Vaskivognar
Kantinuvognar



Vit hava eitt stórt og gott úrval av vaskí- og kantinuvognum

P/f Thomas Dam á Hálsi Wholesale
Heykavegur 1 • 100 Tórshavn • Tel. 311400 • Fax 315574
th-dam@post.olivant.fo
Sosialurin - 311820

**Skrivstovustarv**

Vegna eitt av viðskiftafólkum okkara, eitt fakfelag við skrivstovu í Tórshavn, verður søkt eftir skrivstovufólki at byrja 01.04.2000.

**Arbeiði:**
- at taka sær av brævskifti
- taka telefon
- annað fyrifallandi arbeiði á skrivstovuni

**Førleikakrøv:**
- skrivstovuútbúgving ella líknandi útbúgving
- køn/kønur í rættskriving, serliga í føroyskum, men eisini í norðurlendskum og enskum máli
- hollar royndir innan EDV/tekstviðgerð
- royndir frá skrivstovuarbeiði

**Setanartreytir:**
- sambært avvarðandi sáttmála

**Umsóknarfreist:**
- hin 25.03.2000
- við umsóknini skulu sendast avrit av próvskjølum og møguligum viðmælum

Áhugaði kunnu við at venda sær til Páll Nielsen fáa nærri upplýsingar um nevnda starv.

**Advokatvirkið**
Páll Nielsen, adv. • Sigmund Poulsen, adv.
J. H. Schrøtersgøta 20 • Postsmoga 85
FO-110 Tórshavn
Tlf. 312171 • telefax 318574
E-mail: advokat@post.olivant.fo

Halt sosialin

**FASTALÁVINT**

Í 3'ARANUM fáa tit steypið tit skulu nýta til KATTAKONGIN 2000.

Kom inn til okkara og síggj okkara stóra úrval innan steyp og heiðursmerkir



3arin
SMS • Tel. 31 98 20 - 31 06 06
Fax 31 49 55
E-mail: tryarin@post.olivant.fo
Sosialurin - 311820

**GÓÐIR BRÚKTIR BILAR TIL SØLU**

| Merki | Árg. |
|---|---|
| Ford Escort 1,8 Diesel | 94 |
| Fiat Cinquecento | 95 |

*Fígging kann útvegast*

Bilfríðkan
Velbastaðvegur
110 Tórshavn
Tel. 317300 - 217300
BMW FIAT

**Dagrøktarmamma**

Søkt verður eftir dagrøktarmammu í Skálavík, at byrja skjótast gjørligt. Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Dagrøktina á Sandi, tlf. 361528.

**Dagrøktin í Sands kommunu**

**Vit átaka okkum allan vanligan grevstur við beltmaskinum so sum:**



* Planering
* Veitir
* Tún
* Innkoyringar
* Vatn-/kaðalveitir
* Dren
* Havar
o.a.

Ring og hoyr nærri. Vit geva óbindandi tilboð.
Koyrt verður um landið.

**ES-grevstur**
Tórshavn • Tel. 21 66 00
Sosialurin - 311820